gult6 cyan6 magenta6 svart6



Útflutningsvinnan hart rakt:

# Mugu bróta avtalur

**Í løtuni situr Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, og skrivar brøv til kundar í Evropa um, at fyritøkan ikki er før fyri at veita teimum vøruna eftir gjørdum avtalum. Orsøkin er verkfallið**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag rakar útflutningsvinnuna ógvuliga meint. Regin Jacobsen sigur, at øll framleiðslan á teirra virki er steðgað, og nú verða boð send til teir kundar, ið hava biðið um vøru, at verkfallið forðar fyri allari framleiðslu.

Einki arbeiðið hevur verið síðan mánadagin, tá Bakkafrost ikki tók meira av ráðvøru inn, tí verkfall var í væntu.

– Tilsamans arbeiða eini 120 fólk hjá okkum, og eini 100 eru í verkfalli. Vit fáa tí ikki framleitt ta vøruna, ið kundar í Evropa hava keypt frá okkum, og sum vit skuldu levera í næstu viku. Vit vita heldur ikki, at nær vit kunnu veita kundunum vøruna, og so vóna vit, at teir skilja okkara støðu, sigur Regin Jacobsen.

Bakkafrost hevur sostatt mist søluna fyri eina viku, og talan er óivað um nógvan pening, ið fyritøkan missir.

Verkfallið rakar alt virksemið hjá Bakkafrost, ið umfatar smoltstøð, alistøð, góðskingarvirkið, kryvjivirki og kassavirkið.

Størsti trupulleikin er, at tað ikki ber til at framleiða liðugvørur á góðskingarvirkinum og á kryvjivirkinum. Hinvegin klára smoltstøðirnar og alibrúkini seg so dánt, hóast tað er verkfall. Fóðringin er automatisk, so fiskurin fær føðslu, men deyður fiskur verður ikki tikin, og ringarnir verða heldur ikki fluttir á streymasjógv, sum teir eiga.



*Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, hevur síðan verkfallið sent boð til kundar í Evropa um, at tey ikki kunnu levera vøruna sum avtalað. Hann heldur verkfallið vera ábyrgdarleyst*

### Ábyrgdarleyst verkfall

Regin Jacobsen heldur tað annars vera ábyrgdarleyst av Ingeborg Winther og arbeiðarafeløgunum at fara í verkfall yvir hesa trætuna.

– Semingsuppskotið ljóðaði skilagott, tá havt verður í huga, at ein stórur partur av arbeiðarafeløgunum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum hevur góðtikið ta lønarhækkingina.

Hækkingin er so mikið høg, at tað verður nakað væl dýrari hjá fyritøkunum. Ein fyritøka sum Bakkafrost, ið rindar 25 milliónir krónur í lønum um árið, skal eftir hinum sáttmálanum nú av við 28 milliónir. Tað kann vera ein dyggur smeitur hjá fyritøkum, ið ikki hava nóg stórt avlop.

– Tað er órealistiskt at halda seg fáa nakað meira enn tað, hini fakfeløgini hava góðtikið, men hinvegin haldi eg tað vera í lagi við eini lønarhækking, men eitt mark er fyri hækkingini, sigur Regin Jacobsen.

# Skúlarnir standa skitnir

**Flestu skúlarnir kring landið verða ikki vaskaðir dagliga sum vant, tí vaskikonurnar eru í verkfalli. Hetta ber ikki til í nógvar dagar, og tí vera flestu skúlarnir væntandi stongdir í næstu viku, um verkfallið heldur fram**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Símun Abramsen, varaskúlastjóri á Argja skúla, heldur, at allir skúlarnir í Havn fara at lata aftur samstundis, um tað kemur so langt.

Hann sigur, at skúlastjórarnir í Havn óivað fara at tosa saman um støðuna og fremja somu tiltøk allastaðni.

Ongir fastir reglar eru á hasum økinum, men talan hevur verið um tveir dagar, og so verður skúlagongdin steðgað, men ein meting á staðnum verður altíð avgerandi fyri, hvat gerast skal.

Argja skúli og fleiri aðrir skúlar í Havnini hava skrivliga roynd fyri framhaldsdeildina í næstu viku. Óvist er um tær royndirnar verða raktar av verkfallinum. Annars fara skúlarnir kring landið at ráðføra seg við mentamálastýrið um støðuna.

Símun Abrahamsen heldur, at tað hevði verið ógvuliga harmiligt, um næmingarnir aftur í ár verða raktir av verkfalli, tí í fjør vóru lærararnir í verkfalli í fimm vikur.

Ikki allir skúlarnir í landinum eru raktir. Eysturskúlin í Havn hevur privat vaskifólk, og tey eru ikki limir í arbeiðarafelag. Tí skuldi verkfallið ikki nerva skúlagongdina har.

# – Eg kann lasta flogførini sjálvur

**Stjórin á Atlantsflog roknar ikki við, at flúgvingin hjá felagnum verður avlýst orsaka av verkfallinum**

FLOGFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Flogferðslan til og úr Føroyum heldur fram hóast verkfallið, men helst verður tænastan merkt komandi dagarnar.

– Vit rokna ikki við, at verkfallið fær álvarsamar avleiðingar fyri flúgvingina. Vit ætla at flúgva, hóast talan kann gerast um seinkingar, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog.

Fólkini, sum lasta flogførini, eru farin í verkfall, men hetta fer ikki at forða fyri, at flogførini kunnu flúgva. Ein avleiðing kann vera, at ferðafólkini ikki fáa alt viðføri við, og at tænastan í sambandi við flúgvingina ikki verður, sum hon plagar at vera.

– Um tað verður neyðugt, so kann eg lasta flogfarið sjálvur. Eg eri stjóri og kann gera tað, sum eg havi hug til, sigur Magni Arge.

Eisini Maersk Air roknar við at flúgva sum vanligt komandi dagarnar.



*– Um tað verður neyðugt, so kann eg lasta flogfarið sjálvur. Eg eri stjóri og kann gera tað, sum eg havi hug til, sigur Magni Arge, stjóri á Atlantsflog*

# Verkfallið kann órógva framsýnarar

**Størsta sølustevnan í Føroyum nakrantíð verður gjøgnumførd hóast verkfallið, men fyrireikararnir halda, at talan er um sera óhepna støðu**

NAFF
*Eyðun Klakstein*

Risastóra fiskivinnutiltakið hjá runavíkingum, North Atlantic Fish Fair, sum verður í komandi viku, verður hildið sum ælta.

– Fyrireikingarnar av stevnuni verða ikki raktar sum so. Tríggir mans, sum vóru við at seta tiltini upp, eru farnir til hús, men hetta arbeiðið er so gott sum liðugt, so har verður eingin trupulleiki, sigur Símun Hammer, projektleiðari fyri stevnuna.

– Hetta er tó ein sera óheppin støða, og tað kann gerast ein trupulleiki fyri framsýnararnar, um teir ikki fáa alla sína vøru til landið.

### Góðtaka ikki mistøk

Fyrireikararnir av NAFF hugsaðu um møguligt verkfall, tá stevnan varð løgd í mai mánaði.

– Vit viðgjørdu fyrimunir og vansar, og eitt møguligt verkfall varð eisini nevnt, men hinvegin hava vit ikki havt verkfall í nógv ár, so vit hildu tað var ráðiligt at leggja stevnuna nú, sigur Símun Hammer.

– Heldur verkfallið fram komandi vikuna, so fer tað at merkja seg á stevnuni. Men nógvir av framsýnarunum hava roynt sítt áður – til dømis í Fraklandi – so teir góðtaka helst, at verkfallið fær onkrar avleiðingar.

– Teir góðtaka tó ikki, at vit ikki kláru at skipa stevnuna nóg væl, so tað er umráðandi hjá okkum, at alt er so væl fyriskipað sum gjørligt, og so verður neyvan nakar veruligur trupulleiki av verkfallinum, sigur Símun Hammer.

# 15 mans farnir í verkfall

**Arbeiðið á Skipasmiðjuni á Skála er partvís órógvað av verkfallinum, men allir handverkararnir arbeiða sum vanligt**

SKIPASMIÐJA
*Eyðun Klakstein*

Skipasmiðjan á Skála er partvís rakt av verkfallinum, sum varð sett í verk í gjár.

– Eini 15 arbeiðsmenn eru farnir í verkfall, men allir handverkararnir arbeiða sum vanligt, sigur Marni Olsen, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála.

– Verkfallið órógvar millum annað máliarbeiðið hjá okkum. Til dømis eru onkrir snøklar eftir at mála á Dúgvuni, men hon kann fara í sigling fyri tað, sigur.

Smyril er eisini í dokk, og ætlanin var at mála okkurt smávegis á størsta strandfaraskipinum, men hetta verður ikki gjørt hesaferð.

– Vit royna at arbeiða sum vanligt, men slíkt verkfall órógvar altíð eitt sindur, sigur Marni Olsen.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Vit eru vælnøgdir

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag er væl nøgdur við sáttmálan, sum varð gjørdur við arbeiðsgevararnar týskvøldið**

SEMJA
*Áki Bertholdsen*

– Vit eru vælnøgdir við sáttmálan, vit hava fingið.

Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, heldur ikki, at tey fingu so lítið burturúr semjuni, sum var ðgjørd við arbeiðsgevararnar týskvøldið.

Sáttmálin ber í sær, at at limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag og øll arbeiðsfólk í Klaksvík, fáa eina lønarhækking uppá 4,24 krónur afturat frá 1. mei at rokna og 1. mei næsta ár fáa tey aftur 4, 24 krónur afturat.

Í løtuni er tímalønin 83,72 um tíman. Fyrsta mei í ár kom tímalønin sostatt upp á 87,96 krónur og 1. mei komandi ár, er tímalønin komin upp á 92,20 krónur um tíman.

Harumframt eru ymsar viðbøtur hækkaðar. Eitt nú hevur yvirtíðin fyrrapart leygardag verið 35% og 65% seinnapartin leygardag. Nú er yvirtíðin altíð 65% leygardag. Fyri at koyra oljubil er viðbótin hækkað tvær krónur um tíman.

Harafturat hækkar eftirlønin 0,8 % í ár og aftur 0,8% næsta ár.

Viðbótin fyri skiftivaktir er eisini hækkað 75 oyru.

Tilsamans er talan um eina lønarhækking uppá 11,9% og tað er tað saman, sum limirnir í Starvsmannafelagnum hava fingið.

– Sjálvandi kundu vit altíð hugsa okkum meiri. Men tað slepst ikki undan, at tá ið Starvsmannafelagið gjørdi sín sáttmála, varð støðið lagt og tá er ómetaliga trupult at fáa nakað meir sigur Karl Johansen.

Somuleiðis varð semja gjørd um eitt protokollat sum sigur, at um eitt ár skulu samráðingar verða um viðbøturnar av øllum handa slag -fyri at koyra trukk, fyri at koyra oljubil, fyri at løða og spreingja o.s.fr.

Hetta verður gjørt fyri at halda spurningin um viðbøtur leysan av vanligu samráðingunum.

Karl Johansen sigur, at arbeiðsgevararnir hava ásannað, at tað ber ikki longur til at seta seg ímóti lata viðbøtur fyri serlig arbeiði, tí gera teir tað, fáa teir ongan at gera arbeiðini.

– Og at lata burturav vanligu lønarhækkingini fyri at fáa viðbøtur, gera vit ikki. Tí eru samráðingar um viðbøtur nú leysar av vanligu samráðingunum, sigur Karl Johansen.



*Samráðingarnar ímillum Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík og Arbeiðsgevararnar endaðu í sátt og semju. Men tað er ongin avtala um, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag skulu ikki fáa meiri, sigur Karl Johansen*

### Ongin avtala

Annars loypti tað øði í fakfelagsfólk, tá ið tað varð upplýst, at tá ið Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík skrivaðu undir, varð avtalað við arbeiðsgevarar og semingsmenn, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag skuldi ikki fáa størri lønarhækkig.

Hesum vísir Karl Johansen avgjørdur aftur.

–Vit fara ikki at gera avtalu um, hvat onnur arbeiðarafeløg skulu fáa í løn. Tað er ongin av okkum, sum fer at siga, at verkafólk ikki skulu fáa meiri enn eitt vist.

Men Havnar Arbeiðsmannafelag vísir á, at seinast, samráðingar vóru, gjørdu Havnar Arbeiðsmannafelag og klaksvíkingar sáttmála, áðrenn Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

– Tá ið Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag so gjørdu sáttmála, fingu tey hægri viðbøtur í ávísum førum.

–Tá ið vit fóru til samráðingar hesuferð, løgdu vit tískil dent á, at vit vildu hava mismunin, sum varð gjørdur í 1999, aftur.

–Hesum vóru arbeiðsgevararnir samdir í og teir løgdu eisini dent á fyri okkum, at teir fóru ikki at at góðtaka, at ójavni bleiv í sáttmálunum, tí tað hevði oyðilagt kappingarførið hjá summum virkjum.

– Vit eru øll á sama arbeiðsmarknaði og tí eiga vit eisini at fáa somu løn. Men at vit hava avtalað, at hini ikki skulu fáa meir, er ikki rætt, tí tað blanda vit okkum ikki uppí. Tað fylgja ongir lepar við semjuni, sigur Karl Johansen.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, heldur fast um, at tað var ein avtala, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag skuldi ikki fáa meir enn klaksvíkingar og Havnar Arbeiðsmannafelag hevði fingið.

–Tað fingu vit at vita frá semingsmanninum. Tí var at kalla sama semingsuppskot lagt fyri okkum, sum Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík høvdu góðtikið, sigur Ingeborg Vinther.

# Semingsmenninir vistu at vit søgdu nei

**– Fleiri tímar, áðrenn semingsmenninir løgdu uppskotið fyri okkum, vistu teir at vit fóru at vraka tað, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Høvdu vit góðtikið semingsuppskotið, høvdu vit havt fingið minni í lønarhækking, enn Havnar Arbeiðsmanna og feløgini í Klaksvík , hava fingið. Og tað kunnu vit ikki góðtaka

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tað var ongin ivi í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag um, at semingsuppskotið, sum varð lagt fyri tey á midnátt síðstu nátt, skuldi vrakast.

– Seinast, vit samráddust, fingu vit í ávísum førum betri sømdir, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík fingu.

Eitt nú fáa Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag 75 oyru meiri fyri arbeiði í skiftivaktum, enn feløgini í Klaksvík og Havnar Arbeiðsmannafelag fáa.

Men eftir semingsuppskotinum nú, skuldi hesin munur útjavnast.

– Sostatt var tað ætlanin, at vit skuldu fáa minni í lønarhækking, enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, høvdu fingið.

Ingeborg Vinther sigur, at tað var full semja í Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag um, at tað kundi ikki góðtakast, at tey hesuferð skuldi betala fyri, at tey vunnu sær nøkur eyka rættindi seinast.

Annars heldur hon, at eftir semingsuppskotinum er lønarhækkingin alt ov lág.

– Vit settu okkum fyri at lønin skuldi upp á 100 krónur um tvey ár. Harumframt hava vit eisini lagt stóran dent á, at okkurt slag av aldursviðbót verður lagt í sáttmálan, so at tey, sum hava arbeitt longi á einum virki, skulu fáa hægri løn enn tey, sum akkurát eru byrjað.

Ingeborg Vinther sigur, at tað kom ongantíð til veruligar samráðingar, tí arbeiðsgevararnir vildu ikki viðgerða krøvini. Hinvegin høvdu teir eitt uppskot upp á 8, 84% í lønarhækking.

– Tað kundu vit ikki góðtaka.

Ingeborg Vinther sigur, at beinanvegin Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík høvdu skrivað undir, gjørdu tey semingsmonnunum greitt, at tey fóru ikki at góðtaka semingsuppskotið.

– Kortini løgdu semingsmennirnir á midnátt at kalla sama uppskot fyri okkum, sum hini feløgini høvdu góðtikið. Men fyri at útjavna lønarmunin, høvdu teir tó tikið tey 75 oyruni fyri skiftivaktina burturúr hjá okkum, sum Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík nú hava fingið.

Harafturat eru ongi av hinum krøvunum við.

– Tá ið semingsmenninir kortini leggja sama uppskot fyri okkum, sum teir løgdu fyri Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, er tað helst tí, at Arbeiðsgevararnir ikki vilja eftirlíkað nøkrum av krøvunum.

– Og tá ið hetta er støðan, kunnu vit ikki góðtaka semingsuppskotið og tískil er verkfall nú, sigur Ingeborg Vinther.

*Meira um verkfallið á síðu 12*

